# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Doretha Jacobsen 80 ár



Tann 22. desember verður Doretha Jacobsen í Fuglafirði 80 ár.

Doretha er dóttir Malenu og Hans Martin Eliasen í Heimustovu við Gjógvará í Fuglafirði. Hon vaks upp og traðkaði sínar barnaskógvar í Gjógvarátúni saman við yngru systrini Jonu og fosturbeiggjanum Ingvard Eliasen. Tey høvdu eitt gott og trygt heim. Jona fór til Danmarkar í 1954, har hon sum sjúkrasystranæmingur kom til Nykøbing S og bleiv gift við Sigvaldi Andersen pleygara, og saman fingu tey trý børn, Hans Olaf, og tvíburarnar Lenu og Niels. Jona býr enn í Danmark.

Ingvard kom í húsið at vera sum 14 ára gamal frá ommu og abbanum í Heimistovu, sum hann hevði búð hjá.

Doretha fór sum flestu ungar gentur tá í tíðini út at tæna í fleiri húsum og at passa konur upp. Í 1943, 44 og 45 var hon á Tvøroyri og tænti hjá Emilju og Albert á Sentralinum. Tað hava verið góðir dagar hjá henni, hon tosar altíð so nógv um tað.

18. desember 1948 giftist Doretha við Palma, ið var sonur Hansinu og Jóhannes Jacobsen í Geilini í Leirvík. Tey giftust inn í barnaheimið hjá henni og fingu seks børn: Hans Martin, Hansina, Sigrun, Elibert, Lena og Tordis.

Doretha var heimagangandi meðan børnini vóru smá. Í 1960 bleiv hon sjúk av tuberklum og lá í 10 mánaðar á Sanatoriinum í Hoydølum.

Palmi var sjómaður. Meðan tey eldru børnini vóru smá seinru árini koyrdi hann olju hjá Shell fyri pf. Haraldsen til hann gjørdist álvarsliga sjúkur og eftir bert tveimum mánaðum doyði bara 51 ára gamal 28. mars 1975. Hetta var ein álvarsligur smeitur. Tá var Tordis bert 4 ára gomul.

Doretha noyddist at fara út at arbeiða, hon fór á Ísvirkið hjá Haraldsen og hennara partur lá ikki eftir, røsk og arbeiðssom sum fáur. Hvør kennir ikki rullupylsurnar, kjøtpylsurnar og knettini sum hon saman við øðrum gjørdi í nógv ár og í flakavinnuni til tað steðgaði fyrst í 90-unum.

Hon hevur ikki lagt stilt, nei minni enn so. Hon ger knettini heima við hús. Tað fer maður av húsi hvønn mánamorgun til Haraldsen at keypa knettir.

Aktiv er hon í Pensionistafelagnum, gongur til Dagtilhaldið í Luffustovu hvørja ferð og í Felagslonina til sjavskappingar, bingo, møtir væl upp og sera tíðliga.

Í september 1948 tóku foreldrini hjá Dorethu, Lenu, sum tá var 61 ára gomul, og Hans Martin, tveir mánaðar gomlu Birgit til fostur, tí mamman, Kristina, sum var gift við Hans Øre, doyði so brádliga frá fýra smáum børnum, Johnny, Eyðbjørn, Helgi og Birgit. Birgit kom at kalla Lenu fyri mammu, hon var ommusystur hennara. Birgit var ein góð stórasystur fyri tey seks systkini sum vuksu upp í Gjógvará. Doretha og Palmi tóku hana sum sítt barn.

Sera hart tók tað henni og okkum øllum, tá ið Birgit so brádliga 8. apríl gjørdist álvarsliga sjúk og bert eina viku seinri doyði frá okkum. So hon hevur ikki bara fingið viðrák, nei minni enn so. Doretha býr í dag einsamøll í húsi, men har hava mangan verið mong í gjøgnum árini.

Til seinast vilja vit ynskja tær hjartaliga tillukku á 80 ára degnum og gleða okkum at vera saman við tær, familju, vinum og kenningum 22. desember kl. 19.00 í Felagslonini. Gleðilig Jól.

**M.E.J.**

Fuglafjarðar kommuna:

## Jón Nolsøe Olsen nýggjur havnameistari

Týsdagin 13. desember var almenn móttøka á havnaskrivstovuni í Fuglafirði í sambandvið at havnameistarin Kristian Oluf Christiansen gevst í sínum starvi vegna aldur og Jón Nolsøe Olsen tekur við tann 1. januar 2006.

Kristian Oluf Christiansen hevur verið havnameistari síðan 1997, og leggur hann nú frá sær sum 67 ára gamal. Jón Nolsøe Olsen er 46 ára gamal og útbúgvin stýrimaður. Hann hevur siglt sum yvirmaður í nógv ár, serliga í Grønlandi og í Kanada. Í løtuni er hann søluleiðari á trolvirkinum Vónini í Fuglafirði.



*1. januar 2006 tekur Jón Nolsøe Olsen (h.m.) við sum havnameistari í Fugafirði eftir at Kristian Oluf Christiansen gevst vegna aldur*

*Mynd: Pætur Joensen*

---

†

### Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Tummas Jakob Lið,** Sørvági, fer úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum týsdagin 20. desember klokkan 16. Jarðarferðin verður úr Sørvágs kirkju mikudagin klokkan 13. Tey, ið vilja minnast Tummas Jakob, kunna lata eina peningagávu til Hjartafelagið konto í peningastovnunum.

**Páll Poulsen**, Argir andaðist í Danmark sunnudagin 18. desember, 48 ára gamal. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

**Joen Jacob Joensen**, Skopun andaðist á Landssjúkrahúsinum 19. desember, 88 ára gamal. Farið verður úr Landssjúkrahúskapellinum mikudagin klokkan 14. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

**Meinhard Djurhuus**, skipari, ættaður frá Gjógv, búsitandi í Tórshavn, andaðist sunnudagin í heiminum, 77 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju hósdagin klokkan 13. Tey, ið vilja minnast Meinhard kunnu lata eina peningagávu til Herbergi hjá Frelsunarherinum í Tórshavn.

---

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at elskaði maður, pápi, verpápi, abbi og langabbi

**Meinhardt Djurhuus**

skipari, ættaður frá Gjógv, búsitandi í Tórshavn

andaðist í heiminum sunnudagin 18. desember, 77 ára gamal.
Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju hósdagin 22. desember kl. 13.00.

*Familjunnar vegna*

**Ragnhild, Joen Hendrik, Hans Andrias og Suni v/ familjum**

Tey, ið vilja minnast Meinhardt, kunnu geva eina peningagávu til Herbergið hjá Frelsunarherinum í Tórshavn.

---

# Jarðarferð

Kistan við

**Tummas Jakob Lið**
**Sørvágur**

fer av kapellinum á Landssjúkrahúsinum týsdagin 20. desember kl. 16.00.
Jarðarferðin verður úr Sørvágs kirkju mikudagin kl. 13.00.

Tey, ið vilja minnast Tummas Jakob, kunnu lata eina peningagávu til Hjartafelagið, konto í peningastovnunum.